heilsutrygd

# LEYS STØRV AT SØKJA Á HEILSUTRYGD

## LEIÐSLUFULLTRÚI

Eitt fulltíðarstarv sum leiðslufulltrúi á Heilsutrygd er leyst til setan skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at tryggja at mál verða viðgjørd smb. galdandi lógum og reglum, og tryggja at sáttmálar verða hildnir umframt at luttaka í sáttmálasamráðingum

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni t.d. innan løgfrøði ella almenna fyrisiting
- Starvsroyndir frá almennari fyrisiting er ein fyrimunir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Leiðslufulltrúin fær tilvísing til stjóran.

## FÍGGJAR- og FYRISITINGARLEIÐARI

Eitt fulltíðarstarv sum fíggjar- og fyrisitingarleiðari á Heilsutrygd er leyst til setan skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum at leiða dagligu rakstraruppgávurnar á stovninum og tryggja stovninum eina neyva fíggjarstýring.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Útbúgving frá hægri lærustovni innan fíggjarviðurskifti
- Hollar royndir frá líknandi starvi

Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Fíggjar- og fyrisitingarleiðarin fær tilvísing til stjóran.

## KT-MENNARI

Eitt fulltíðarstarv sum KT-mennari á Heilsutrygd er leyst til setan skjótast tilber.

Arbeiðið er í høvuðsheitum at hava ábyrgd av menning av KT-skipanum til Heilsutrygd.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Útbúgving innan KT frá hægri lærustovni
- Hollar royndir frá líknandi starvi og helst royndir innan tilgildar fyrisitingarliga skipanir

KT-mennarin verður settur í starv sambært sáttmála millum avvarandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. KT-mennarin fær tilvísing til stjóran.

## MÁLSVIÐGERÐI

Eitt fulltíðarstarv sum málsviðgerði á Heilsutrygd er leyst til setan skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum málsviðgerð av hjálparráðum, sum Heilsutrygd yvirtók frá Almannastovuni hin 1. apríl.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- Hóskandi útbúgving sum t.d. sosialráðgevi, skrivstovuútbúgving ella hollar royndir frá líknandi starvi
- Kunnleika til tilíkar málsviðgerðir

Málsviðgerðin verður settur í starv sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag. Málsviðgerðin fær tilvísing til fíggjar- og fyrisitingarleiðaran.

## SKRIVSTOVUNÆMINGUR

Eitt skrivstovulærupláss á Heilsutrygd er leyst til setan skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar alt fyrifallandi skrivstovuarbeiðið á Heilsutrygd.

**Vit hugsa okkum at tú hevur:**
- FHS-, HH-, HF- ella studentsprógv
- Góðan málsligan førleika

Løn og setanartreytir verða sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Skrivstovunæmingurin fær tilvísing til fíggjar- og fyrisitingarleiðaran.

Nærri upplýsingar um størvini eru á finna á www.hmr.fo ella við at venda sær til stjóran á Heilsutrygd, Jan Danielsen á telefon 77 10 10 ella á teldupostbústaðnum jan.danielsen@heilsutrygd.fo. Øll størvini verða sett skjótast tilber, men vit bíða fegin eftir rætta umsøkjaranum. Umsóknir og avrit av viðkomandi prógvum og skjølum skulu sendast til: Postsmoga 52, Stangavegur 53, FO-710 Klaksvík.
**Seinasta freist at senda umsókn og avrit av viðkomandi skjølum er fríggjadagin 7. maj kl. 12.00**

**Um Heilsutrygd:** Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 avloysti gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum borgarum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum.

HEILSUTRYGD · POSTSMOGA 52 · STANGAVEGUR 53, 1. HÆDD · 700 KLAKSVÍK · HEILSUTRYGD@HEILSUTRYGD.FO · TLF: 47 10 10 · FAX: 47 10 11

# GERST MEDIATOR

## Intensivt skeið í mediatión, konfliktmekling

Mediatión er skipaður dialogur, sum gevur ósamdum pørtum møguleika til undir leiðslu av meklara/mediator at tosa seg til sættis.

Samtala kann vera trupul, tá ósemjur eru og nógvar kenslur. Misálit og mistulkingar og óheppið tosingarlag skaðar samskiftið, og trætan kann fastlæsast so, at ilt kann vera at koma sær burturúr aftur uttan hjálp uttanífrá.

Mediator hevur útbúgving sum tann uttanveltaði triðjipersónur, sum skipar samtaluna so, at partarnir lættari gerast førir fyri sjálvir at loysa ósemjuna og at hyggja frameftir.

Meklarin eigur ikki lut í konfliktini, høvdið er kalt og høvið at stýra samskiftinum er tí serstakt. Trætumekling er ein samráðingarháttur at loysa ósemjur og trætur, sum hevur sum fortreyt, at partarnir ynska eina semjuloysn.

Útbúgvingin styrkir samstundis tín egna førleika at samráðast.

**5. mai 2010: kl. 13.00 - 16.00**
Teorisk kunning um konfliktfatan, konfliktmynstur og konflikthandfaringarhættir. Lesast skal tilfar til henda teoretiska partin.

**12. mai 2010: kl. 13.00 - 16.00**
Atburður, tosingarlag og hegni at handfara konfliktstøður.
Hvat er konfliktmekling. Hvat eyðkennir hesa og hvussu kann hon nýtast.

**19. mai 2010: kl. 13.00 - 16.00**
Fortreytirnar fyri dialogi og krøvini til meklaran. Etiskar reglur.

**26. mai 2010: kl. 9.00 - 12.00 og 13.00 -16.00**
Rollுspøl, teori og etiskar reglur

**27. mai 2010: kl. 9.00 - 12.00 og 13.00 - 16.00**
Rolluspøl og teori og etiskar reglur

**28. mai 2010: kl. 9.00 - 12.00 og 13.00 - 16.00**

**Avmarkað luttøka:**
Til tess at luttakararnir skulu fáa høvi veruliga at royna seg sum meklarar, er luttøkan avmarkað til 10 persónar.

**Kostnaðurin:**
Pr. persón kr. 8.000 + mvg - ella **kr. 9.800,- við mvg**. Matur á middegi er íroknaður teir 3 dagarnar, rolluspølini eru. Aftrat kemur kostnaður fyri keyp av 2 bókum, uml. kr. 500,-. Annað tilfar er íroknað skeiðsgjaldinum. Skeiðsprógv verður latið.

Skeiðið og kostnaður eru treytað av nóg stórari luttøku.

**Tilmelding:** hjá Turið Debes Hentze, tdh@hentze.fo

**Málbólkur:**
Einhvør, sum hevur tørv á betri kunnleika at handfara konfliktstøður, og sum hevur ábyrgdina av at handfara tvístøður millum fólk á skilagóðan hátt.

Umframt at fáa førleikan at virka beinleiðis sum mediator, triðjipersónur í eini konflikt, fæst grundleggjandi innlit í, hvussu ein við egnum atburði og málburði ávirkar eina tvístøðu. Undirvísingin mennir eisini eins egnu evnir at samráðast konstruktiv.

**Dømi um málbólkar:**
- Fólk í leiðslustørvum, privat og alment
- Privata vinnan sínámillum
- Fjølmiðlafólk
- Skúlaverkið (skúlamekling, happing, samstarv við foreldur o.a.)
- Løgreglan (samskifti við og millum gerningspersón og offtur)
- Advokatar og dómarar
- Fakfelagsumboð, álitisfólk
- Barnavernd (samskifti við foreldur, børn, avvarðandi, fosturforeldur)
- Kommunur og land - samskifti við borgaran
- Politikkarar

**Teoretiska undirvísingin fevnir um:**
- Konflikt fatan. Ymiskar konfliktloysnir. Egnan leiklut í konflikt. Konfliktmynstur.
- Konfliktupptrapping og -avspenning.
- Evnini at lurta og tosingarlag.
- Dialogur og samráðing. Hvørjar fellur eru - hvat er ikki dialogur
- Hvussu kann leiðarin nýta mediatión og mediatiónsamboðini.
- Hví mediatión virkar og hvørjar treytirnar eru fyri mediatión.
- Hvørji sereyðkennini eru við mediatión.
- Nágreinilig gjøgnumgongd av mediatiónsstigunum.
- Leikluturin hjá pørtunum og meklara.
- Førleikakrøv til meklaran.
- Etiskar reglur.

**Undirvísari:**
Turið Debes Hentze, advokat og mediator, m.m.c.r.

Advokatskrivstovan Hentze

**Tórsgøta 17 – Postsmoga 236**
**110 Tórshavn**
**tel. 311460 – fax 311490**
**hentze@hentze.fo – www.hentze.fo**

